

*Hóast lítið lív er at síggja í bygdini, so boðar barnasúkklan og brøytin aftanfyri, at her er lív – og verður lív í framtíðini* *Mynd: Snorri Brend*

# Uttan tunnil var einki lív í Kunoy



*– Kom tunnilin ikki til Kunoyar vóru vit í somu støðu sum Svínoy. So var vandi fyri*

**Hóast onkur vil halda, at tær báðar bygdirnar í Kunoyar kommunu ikki hava nakra framtíð fyri sær í alheimsgerðini, so prógvar gongdin tað øvugta.**

**Fleiri tilsøgnir um byggiloyvi eru givnar í Kunoy. Og beint sum tíðindatænastan vitjaði borgarstjóran, Heina O. Heinesen ringdi ein maður at spyrja um møguleikan at ogna sær eitt grundøki í bygdini.**

BYGDAMENNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kunoy:** Tú kemur koyrandi úr Kunoyartunlinum, og løtu seinni daga fyrust húsini í Kunoy undan.

Lítið lív er at hóma í bygdini. Ikki eitt menniskja og ikki ein koyrandi bilur at síggja nakrastaðni.

Í fyrstu atløgu kann tykjast, at í hesi bygdini man neyvan vera lív lagað, nú ein bæði tosar um alheimsgerð og býargerð.

Her kann neyvan vera nøkur framtíð, tí fólkini munnu helst ynskja sær at flyta út í heim ella inn í næsta stórbý. Og nú koyrandi verður úr bygdini og til ein stóran part av landinum, – tja, er nøkur orsøk at verða búgvandi her?!

Við eitt steðgar tú upp. Tí her á einum staði síggjast tvey greið tekin um, at Kunoy ikki er í bólkinum av hóttum bygdum.

## Nýggj sethús

Uttanfyri einum av nýggjaru sethúsunum sæst ein barnasúkkla. Og bara fáar metrar hagani sæst næsta teknið, sum skal mótprógva gongdini, sum ein hevur sæð so nógva aðrastaðni: Ein brøyt er í ferð við at grava út fyri enn einum nýggjum sethúsum.

At hetta ikki bert er nakað sum gestsins gløgga eyga sær, prógvar eisini tað, sum borgarstjórin Heini O. Heinesen sigur:

– Jú, tú hevur rætt. Fólkatalið veksur spakuliga og fer helst framvegis at gera tað.

– Hinvegin so mugu vit staðfesta, at hóast fleiri nýggj sethús eru bygd tey seinnu árini, so er fólkatalið kortini ikki vaksið eins nógv, sigur borgarstjórin.

Tað vísir seg, at nógv av gomlu húsunum í bygdini standa hálvavegna tóm: Tað eru ikki so nógv fólk í hvørjum húsi, og flytir tí ikki onkur yngri inn her, so verða tey standandi tóm.

Tað vóru kanska tey sum hildu, at lítið lív var lagað hjá teimum smærru bygdunum í Norðoyggjum.

Gongdin aðrastaðni vísir, at fólk ynskja at búgva í størri eindum, og mong taka tí stigið og flyta inn til stórbýin.

Men tá borgarstjórin í Kunoy skal taka samanum, so dugir hann væl at síggja, at henda gongdin sæst ikki so væl aftur í hansara kommunu sum hon ger tað í øðrum støðum.

## Stóð illa til

Skal hann leita eftir orsøkini til hetta, so er svarið eittans og givið uppá forhond: Tann 3,031 km. langi Kunoyartunnilin.

– Fyri meg er eingin ivi, at kom tunnilin ikki í 1988, so hevði neyvan staðið so væl til her við fólki. Ja, so stóð illa til, sigur Heini.

Uttan samanbering annars so skilst á kunoyingum, at uttan tunnilin so hevði bygdin í dag verið meinlík Svínoy, har fólkatalið er í stórari afturgongd. Her hava tey í dag sjóvegis samband og tyrluna at líta á.

Áðrenn tunnilin kom var bert samband hjá kunoyingum við umheimin eftir sjónum nakrar ferðir um dagin. Hóast ein bati er í hesum frá fyrr av, tá báturin bert sigldi tríggjar ferðir um vikuna, so var hetta ikki nøktandi fyri nútíðina.

Hetta veit Heini eisini. Tí sum hann staðfestir:

– Tað tekur somu tíð at sigla úr Kunoy til Klaksvík, sum